## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av eystri og landsynningi og stundum regn. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt, men út á seinnapartin regn. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, týsdagin hækkar hann upp í landnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

# Fjarritini hjá Føroya Tele nýggjan ham

**Nýggju skreytbløðini, sum fjarrit eisini verða kallað, verða nú tikin í nýtslu, og er tað listarkvinnan Jóna Rasmussen, ið stendur aftanfyri nýggju fjarritini.**

SAMSKIFTI
*Ingrid Bjarnastein*

Í samband við, at Føroya Tele hevur fingið nýggj fjarrit, høvdu teir mikudagin móttøku í Tænastumiðstøðini. Til staðar vóru millum annað listarkvinnan, Jóna Rasmussen, ið hevur staðið fyri motivunum á nýggju fjarritunum, deildarleiðarin á Tænastumiðstøðini, Aksel Haraldsen og Armgarð Weihe, samskipari.

**Frá 600.000 niður á 12–15.000**

Tá fjarritatindurin var hægstur, vórðu meira enn 600.000 fjarrit send um árið. Nú liggur talið á umleið 12–15.000. Grundin til tess er, at samskiftisviðurskiftini eru nógv broytt síðani byrjað varð at samskifta við útheimin. Í 1954 vóru fjarrit einasti mátin at samskifta við útheimin uppá

At Føroya Tele nú hevur valt at endurnýggja ein miðil, ið kanska tykist at doyggja út er, at teir halda, at tað er umráðandi at halda lív í eini gamlari vøru. Tað verða nóg nógv fjarrit send til, at hetta loysir seg.



*Frá vinstru: Richard Mortensen, marknaðarstjóri, Jóna Rasmussen, listarkvinna, Armgarð Weihe, samskipari og Aksel Haraldsen, deildarleiðari. Myndin tey hava ímillum sín verður kallað »Svart fyri sól«*

**Arbeiðir við grafikki**

Jóna Rasmussen er tann, ið prýtt hevur nýggju fjarritini. Í hesum føri er tað grafikkur, hon hevur arbeitt við, men eisini fæst hon við máling.

– Eg finni íblástur í gerandisdegnum. Tað eru lutir og úttrykk úr gerandisdegnum, sum kunnu verða tulkaðir á ymsar hættir, ið eru á myndunum, sigur Jóna Rasmussen.

Allar frummyndirnar eru svart/hvítar, men samskiparin, Armgarð Weihe hevur arbeitt við myndunum inni á telduni, og lagt lit á.

**Skipapakkar**

Nakað nýtt, ið Føroya Tele nú fer undir við, er at bjóða skipum eina eskju við fjarritum og brævbjálvum í, soleiðis at manningin eisini kann fáa prýdd fjarrit. Fyrr hevur tað verið soleiðis, at heilsanin hevur bert verið skrivað á eitt ella annað, ið hevur verið til taks. Føroya Tele heldur, at tað er heilt avgjørt stuttligari hjá manningini at fáa eitt veruligt fjarrit, júst soleiðis, sum vit heima á landi gera. Tí eru teir farnir undir hesa tænastuna.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 16 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 20 |
| Róm | – |
| Malorca | 24 |
| Athen | – |
| Malta | 27 |
| Tunis | – |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 16 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 982 hPa. á 52N-27V fer móti Skotlandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin. Ódnin »HUMBERTO« er nú sunnan fyri New Foundland og fer eystureftir.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani fer norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/09 kl. 06⁰⁰– 27/09 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,0°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 26/09 kl. 06⁰⁰– 27/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 47,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

24. sept.: Fyrra kvarter
29. sept.: Mánin longst frá jørðini
2. okt.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. sep | 04.44 | 17.05 | 03.44 | 16.05 | 03.59 | 16.20 | 06.44 | 19.05 | 07.44 | 20.05 | 02.59 | 15.20 | 01.59 | 14.20 | 04.59 | 17.20 | 05.59 | 18.20 | 04.29 | 16.50 | 05.44 | 18.05 |
| 29. sep | 05.27 | 17.48 | 04.27 | 16.48 | 04.42 | 17.03 | 07.27 | 19.48 | 08.27 | 20.48 | 03.42 | 16.03 | 02.42 | 15.03 | 05.42 | 18.03 | 06.42 | 19.03 | 05.12 | 17.33 | 06.27 | 18.48 |
| 30. sep | 06.10 | 18.28 | 05.10 | 17.28 | 05.25 | 17.43 | 08.10 | 20.28 | 09.10 | 21.28 | 04.25 | 16.43 | 03.25 | 15.43 | 06.25 | 18.43 | 07.25 | 19.43 | 05.55 | 18.13 | 07.10 | 19.28 |
| 1. okt | 06.47 | 19.03 | 05.47 | 18.03 | 06.02 | 18.18 | 08.47 | 21.03 | 09.47 | 22.03 | 05.02 | 17.18 | 04.02 | 16.18 | 07.02 | 19.18 | 08.02 | 20.18 | 06.32 | 18.48 | 07.47 | 20.03 |